Umhugsa forboð ímóti politibilum

Nú skal greiða fáast á, hví bremsurnar á Ford Mondeo bilunum, sum løgreglan brúkar, við hvørt svíkja. Í Føroyum hevur onkur tilburður verið, har bremsurnar á politibili knappliga ikki riggaðu

EYÐUN KLAKSTEIN

Danska politistafelagið, har tað føroyska felagið hjá politistum er limur, umhugsar nú at forbjóða politistum at brúka Ford Mondeo politibilarnar.

Orsøkin er, at bremsurnar á hesum bilum javnan svíkja, og tað ger, at politistarnir kenna seg ótryggar við at nýta hesar bilar.

Í Føroyum eru flestu politibilarnir av slagnum Ford Mondeo, og um danska politistafelagið setir forboð ímóti nýtsluni av hesum bilum, fær tað eisini ávirkan á føroysku løgregluna.

Nøkur politistafeløg í miðjútlandi hava longu fingið nóg mikið. Feløgini hava noktað politistum at koyra hesar bilarnar, tí teir kunnu vera vandamiklir.

– Okkum dámar væl Modeo-bilarnar, men um danska politistafelagið fer at seta forboð ímóti hesum bilum, so fara vit at fylgja hesum boðum, sigur Kristian Dahl, sum er næstformaður í føroyska politistafelagnum.

Hava eisini svikið í Føroyum

Trupulleikarnir við bremsunum á Modeo-bilunum hava verið afturvendandi seinastu árini, men tað er ongantíð vorðið greitt, hvi bremsurnar við hvørt svíkja.

Ingibjørn Eldevig, sýslumaður á Sandoynni, hevur roynt bremsusvikið hjá Mondeo.

– Tað var á heysti í 1997, tá grind var í Húsavík. Eg skuldi skunda mær til Sands, men tá eg kom úr Líðini og skuldi taka eitt sving, riggaðu bremsurnar ikki. Tíbetur var vegur fyri framman, og einar 100 metrar seinni steðgaði eg, greiðir hann hann frá.

Eingin skaði stóðst av hendingini, men sýslumaðurin gav fráboðan um hendingina, og bilurin varð kannaður á verkstaði. Tað einasta boðið upp á, hvat var hent, var at sýslumaðurin hevði brúkt bremsurnar í so dúgliga á ferðini úr Húsavík, og at tær tí sviku í eina førðinum.

Síðani hevur Ingibjørn Eldevig ongantíð upplivað sama feilin aftur, og í vikuni fær sýslumaðurin á Sandi ein nýggjan politibil – ein Ford Mondeo.

Í hesi vikuni skulu umfatandi kanningar gerast av nøkrum Mondeo-bilum í Danmark, og eftir úrslitið av hesum kanningum fer danska politistafelagið at taka støðu til, hvat skal henda víðari í málinum.

Eini 500 Mondeo-politibilar eru í ríkinum.

Bremsurnar á Ford Mondeo politibilunum svíkja við hvørt, og tað kann hava við sær eitt forboð ímóti at nýta hesar bilar sum politibilar. Mynd: Jens Kristian Vang

Tríggir av portørunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi frammanfyri nýggja sjúkrabilin, sum varð tikin í nýtslu í gjár. Mynd: JH

Tóku nýggjan sjúkrabil í nýtslu í gjár

EYÐUN KLAKSTEIN

Seinastu vikuna hava portørarnir á Klaksvíkar Sjúkrahús royndarkoyrt nýggja sjúkrabilin, sum er komin til Klaksvíkar.

Talan er um ein VW Transporter við dieselmotori, sum í gjár varð tikin í nýtslu.

– Hesin bilurin er nýggjur fyri okkum, og tað er ymiskt, sum er øðrvísi samanborið við gomlu bilarnar. Tí hava vit brúkt eina viku til at venja okkum við bilin, áðrenn vit tóku í brúk, sigur Jaspur Johannesen, sum er ein av portørunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Umframt nýggja sjúkrabilin eru tveir aðrir sjúkrabilar í Klaksvík, men hesir eru báðir gamlir og slitnir. Herfyri var nógv umtala av, at annar av hesum gomlu bilunum breyt ein aksil, meðan hann var í neyðsendarørindum.

Annar av gomlu sjúkrabilunum skal nú á verkstað, har stórar umvælingar skulu gerast á hann. Ætlanin er, at báðir teir gomlu sjúkrabilarnir skulu brúkast saman við tí nýggja bilinum.

– Vit hava brúk fyri trimum sjúkrabilum, tí vit eru so nógv av oynni við bilunum. Vit flyta millum annað fólk til Havnar og til flogvøllin, og í miðal eru vit tríggjar dagar um vikuna úr Klaksvík við sjúkrabili, sigur Jaspur Johannesen.

Nýggir sjúkrabilurin er fýrahjólstrektur, og tað halda portørarnir verður ein fyrimunur í vetur.

Ein heimur uttan fyri ríkisfelagsskapin

PISUFUNDUR. Í Pisurø›uni hjá trimum málslingum gjørdi rø›arin vart vi›, at fleiri føroyingar velja at útbúgva seg ví›ari a›rarsta›ir enn í Danmørk. M.a. í Føroyum

Stefan í Skorini bar vegna seg og tveir floksfelagar fram pisurø›una í vi›arlundini í farnu viku.
Mynd: Jens Kristian Vang

HØGNI MOHR

Tríggir málsligir studentar høvdu í felag skriva› pisurø›una, sum Stefan í Skorini bar fram á pisufundinum í vi›arlundini í farnu viku. Stutta rø›an var merkt av bjartskygni, og ta› tóktist púra greitt, at rø›uhøvundarnir, Kristian Eli Andersen, Katrin Dam á Neystabø og Stefan í Skorini, ikki bóru ótta fyri framtí›ini.

Broyting

Stór broyting er farin fram í føroyska skúlanum, og hetta røddi Stefan eisini um. Hann sta›festi, at ta› nú í størri mun ber til at velja sær a›ra útbúgving enn student og HF. Og hetta hev›i sambært hann havt vi› sær, at studentar ikki longur høvdu somu framíhjárættindi og sama status sum á›ur.

Telduheimurin ávirkar eisini útbúgvingarhugin. Stefan í Skorini seg›i, at nú var ikki longur ney›ugt hjá øllum at fara skúlalei›ina:

- Dømi eru í dag um nógvar sokalla›ar teldusnillingar, sum heldur enn at fara í skúla, eru sjálvlærdir, og sum eftir fólkaskúlan hava fingi› gó› størv í føroyskum og útlendskum teldufyritøkum, seg›i Stefan og endurgav ein útlendskan serfrø›ing í kunningartøkni, sum vildi vera vi›, at ta› í dag bar til hjá einum 15 (fimtan) ára gomlum teldusnillingi at vera hægri løntur enn væl útbúgvin 50 (fimti) ára gamal stjóri í onkrari fyritøku.

- Men vit studentar ætla ikki at lata teldurnar st‡ra okkum. Vi› tí hollu útbúgving, vit hava fingi›, ætla vit at st‡ra teldunum, seg›i Stefan afturímóti.

Útbyggi› fró›skaparsetri›

- Ta› er ein heimur uttan fyri ríkisfelagsskapin, endurgav Stefan, Karsten Hansen, landsst‡rismann, fyri at siga. Hetta seg›i rø›arin í sambandi vi›, at fleiri føroyingar velja at útbúgva seg ví›ari a›rarsta›ir enn í Danmørk. Eisini í Føroyum eru møguleikarnir at fáa hægri útbúgving vor›nir størri. Men Stefan í Skorini og floksfelagar kundu væl hugsa sær, at Fró›skaparsetri› var› útbygt, til tess at økja um útbúgvingarmøguleikarnar her á landi.

- Hví skal alt ljósi› í landsu›ri liggja? Heldur vit runt alla havsbrúnna hyggja, harav birtist ljósi› í Føroyum, las Stefan upp úr yrking hjá J.P. Gregoriussen.

Fjór›i G

Rø›an hjá teimum trimum málslingunum snú›i seg eisini um hugtaki›, at »realisera« sjálvan seg. Rø›arin mælti ungdómum til at fara út í heim at fjakka, á háskúla ella kanska í anna› land at arbei›a. Og vantar teimum ungu pening, so er sambært Stefan eittans val:

- Ta› krevur bert at melda seg í 4. G ni›ri á Fiskavirking. Ta› eiga vit sum studentar heldur ikki at ræ›ast, gjørdi Stefan greitt.

Flytifuglur kemur aftur

Í skaldborna endanum á rø›uni í gó›a ve›rinum í vi›arlundini ó›inskvøldi›, røddi Stefan í Skorini um brøtt bjargalendi.

- Lítla land okkara hevur mong ymisk bjargalendi, og tey skulu bæ›i søkjast og røkjast. Nú fara vit studentar at klíva n‡ggj og óroynd bjargalendi. Og so flúgva vit pisur avsta›, nakrar á nærlei›um, a›rar á fjarlei›um. Men flytifuglurin kemur altí› aftur til land okkara, Føroyar, tí her er heim okkara, spáddi Stefan í Skorini at enda.